# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur hóskvøldið 31. august**
***Norðoya Vistarheim:*** kl. 19.30 Elsa Funding

**12. sunnudag e. trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Bergur D. Joensen, Heri Joensen og Anfinn Skaheim. Altargangur
***Sørvágur:*** kl. 11.00, Deyvagudstænasta, altarg., Jónsvein Bech. ***Talvan gongur fyri deyvameinigheitina***
***Bøur:*** kl. 11.00, altarg., David Johannesen
***Haldarsvík:*** kl. 11.00 altarg., Marjun Bæk
***Hvalvík:*** kl. 12.00, Mogens Tilsted Christensen
***Fuglafjørður:*** kl. 11.00, Familjugudstænasta, Uni Næs
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00 Martin R. Jacobsen
***Skála:*** kl. 11.00, Jógvan Fríðriksson
***Sjóvar kirkja: kl. 12.10***, Jógvan Fríðriksson
Eiði: kl. 12.00, Messa (børn syngja) Emil Olsen. ***Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju á Eiði kl. 12.00.***

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudag kl. 15.00 Bøn.
Hósdag kl. 20.00 byrjar Heimaforbundið aftur. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Sunnudag kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Tað verður møti sunnudag kl. 18.00, major Njál Djurhuus talar.
www.frelsunarherurin.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti við Jónhild Dunya, greitt verður frá arbeiðinum í Ghana.
Týskvøldið kl. 20.00 Møti við Heðin Lamhauge, greitt verður frá arbeiðinum við Ny Generasjon. www.gospel.fo

**Havnar kirkja**
Fríggjakvøldið kl. 21.00-23.00 Aftankvirra, kl. 22.00 syngur Petra Iversen.

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20.00 Bibliutími og bønarløta, Páll Poulsen talar.
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti. Vegna umbyggingina í Ebenezer verða ungdómsmøtini í Hebron til eina ferð í november mánaði.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12.00, Sunnudagsskúli og møti. Anja Nielsen úr Klaksvík greiðir frá. Hon fer í november mánaði til Filipsoyggjarnar.
www.hebron.fo

**Ebenezer**
Týsdagin kl. 18.55 Sangvenjing, Gospel Hearts - venja í Ebenezer.
Kl. 20.00 Sangvenjing - Ebenezerkórið - venja í Ebenezer.
Mikudag kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti - Talari Poul Guttesen.
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti - Talari: Poul Guttesen. Møti er í Hebron á Argjum.
Fríggjadag kl. 20.00 Teen-Night. Vit samlast í Sloans Húsi, Tinghúsvegur 10.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, talari Poul Guttesen.
www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Týskvøldið kl. 20.00 Bibliutími, Matt. 17,10-27.
Mikukvøldið kl. 19.00 Meinigheitskórið venur.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, har gyklarin Rógvi Dam vitjar. Sunnukvøldið einki møti - víst verður til møti kl. 18.00 í Ítrottarhøllini á Hálsi v. Anfin Skaaheim. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívdin á Brekku 3**
Týskvøldið tiltak á Brekku 3.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Mikudagin kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið venur.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 møti við Jónhild Dunya, greitt verður frá arbeiðinum í Ghana.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Arnold og Ingibjørn.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Heðin Lamhauge. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bróðurringurin á Havinum**
hevur ársmøti í døgunum 8.-10. september 2006 í Missiónshúsinum Thabor í Fuglafirði, har øll eru vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Børn, bibliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Oddur á Lakjuni talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gjógv**
Vikuskiftismøtir verða í Gjáar samkomuhúsi.
Fríggjakvøldið 1. sept. kl. 20.00 Hugnaløta við nógvum sangi.
Leygarkvøldið kl. 20.00 Evangel. møti og sunnukvøldið kl. 18.00 Evangel. møti. Drekkamuður aftaná møtini. Tórmund og fleiri luttaka við sangi og vitnisburði.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Fríðbjørg Michaelsen.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Mogens Thilsted.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Týskvøldið kl. 21.30 Bønarløta.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bibliutími við Mikkjal Joensen.
Hóskvøldið kl. 19.00 Bønarløta.
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús. Øll vælkomin.
www.kuff.fo

**Aglow í Klaksvík**
Møti verður í Soli Deo Gloria leygardagin 2. sept. kl. 15.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Týsdagin kl. 19.30 Bibliutími.
Mikudagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti við André Matras.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn, kl. 21.00 Konsert í Ósaskúlanum, luttakarar: Heini Lutzen, Mushmellows, Beinta og Ingi og Clifford Edwards (sjaufrurin í »Jesus-bussinum«).
Sunnudagin kl. 14.00 Møti við Sunnudagsskúla. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 Morgunmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20.00 Bibliutími 2. Tess. 1. kap.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hóskvøldið kl. 20.00 Bønarløta.
Sunnudagin kl. 11.00 Halgunarmøti, har evnið er »Bøn«, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Evangel. møti har evnið er »Brúdleyp í Kána«. Loytnantur Ragnar Ludvig talar.
Mánadagin kl. 7.00 Morgunbøn.

Øll eru vælkomin í Frelsunarherin.

**Randers**
**Føroysku møtini í Randers missiónshúsi »Bethania«** (Bøsbrovej 14) byrja sunnudagin 3. sept. kl. 15.00 v/ trúboðarunum Hera Elttør og Hanus Poulsen. Hugnaløta við kaffi o.ø. Øll vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@tilhald.fo
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
***Tilhaldið skipar fyri skeiði fyri kvinnum og monnum í horn- og træhandverki í Tilhaldinum 11.-15. sept. kl. 9.00-16.00.***
***Lærari: Thue Christiansen úr Grønlandi, listhandverksmaður. Kostnaður 1850,- íroknað tilfar o.a. Tilmeld. 316491.***
***Týsdagin 29. august***
kl. 10.00-11.30 Vit syngja, Oddvør Johansen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00 Arbeiði millum muslimar í London. Høgni Johannesen
***Mikudagin 30. august***
kl. 10.00-12.00 Vælgerandi handverksætlan á loftinum

**75 ára føðingardagur**
Hósdagin 31. august verður Esther Petersen, Oyndarfjørður 75 ár. Dagurin verður hildin í handilskjallaranum frá kl. 19.00.

**80 ára føðingardagur**
Hósdagin 31. august fyllir Mathilda Joensen í Líðini í Vági 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**95 ára føðingardagur**
Mikudagin 30. august fyllir Dora Nielsen á Vatnsoyrum 95 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Vágum frá kl. 17.00-21.00. Øll eru vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Mikudagin 30. august verður Brynhild Kirk, ættað úr Oyndarfirði, búsitandi í Esbjerg, 90 ár.

Mikudagin 13. september verður Adolf Rubeksen 90 ár. Dagurin verður hildin á Lágargarði frá kl. 18.00-21.00. Tey, ið vilja gleða Adolf við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 31. august á tlf. 317991.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 19. sept. hava Agnes og Kaj Tausen í Vági silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í VB húsinum leygardagin 23. sept. kl. 19. Tey ið ynskja at gleða okkum vid at koma, verða biðin um at siga fra áðrenn 10. sept. á tlf. +45 60631843, 373059, 373047, 373044.

**Brúdleyp**
Mánadagin 21. august ***giftust*** í Klaksvík, Malan Berg og Egil Johansen, Klaksvík.

Leygardagin 2. september kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni Kristina í Króki, Strendur og Karl Jakob Ósá Eliasen, Klaksvík. Veitslan verður fyri innbodnum kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Leygardagin 2. september kl. 15.00 giftast í Filadelfia, Havn, Rakul Jacobsen og Regin við Skipá. Reseptión verður eftir vígsluna. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 2. september giftast í Lyngby kirkju Anette Højgaard Godtlieb (dóttur til Sólbjørg Højgaard, Saltangará og Niels Erik Godtlieb) og Kenneth Ørgaard, Lyngby. Brúdleypsadr.: Toftegærdet 16, 2800 Kgs. Lyngby.

9. september kl. 15.00 giftast í Glyvra kirkju Anja Lauritsen, Skipanes og Gunnar í Hoyvík Mortensen, Odense. Brúdleypið verður hildið í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

***Hey, vit skulu giftast !***
Leygardagin 9. september kl.14.00, giftast í Sjóvar kirkju, Elly Danielsen, Kolbeinargjógv & Gunleif Djurhuus, Strendur. Veitslan verður í høllini á Skála kl.18.00. Tit, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 258505, 449042, 447739 ella teldupost: elly_danielsen@hotmail.com áðrenn 1. september.




Leygardagin 16. september kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Erla á Torkilsheyggi, Nes og John Dávur S. Djurhuus, Saltangará. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 2. september á tlf. 213383 ella 237163.



***Hey, vit skulu giftast!***
Leygardagin 16. september kl. 13.00 giftast í Bíggjar kirkju Annika Niclasen og Bjarni Niclasen. Døgurði er fyri innbodnum í Missiónshúsinum Libanon í Sørvági kl. 16.00. Kl. 20.00 er Opið hús í Missiónshúsinum og øll eru vælkomin.



Magnus Heinasonargøta 23. 1,
Postboks 205, FO-110 Tórshavn
Tel 31 89 03, Fax 31 87 03

Bókhald - Skuldararøkt - Ráðgeving - Skattauppgerð



**Restaurant Merlot**
**til sølu**

Vit hava nevndu matstovu til sølu.
Matstovan er av “fínara” slagnum og er kend fyri sera góðan mat.
Hon heldur til í leigaðum hølum í miðbýnum (Magnus Heinasonargøtu 20) í Havn.
Í matstovuni er alt nýmótans innbúgv og útbúnaður.
Minsti prísur er settur til kr. 600.000,00, og verður hon seld fyri hægsta boð omanfyri tað.

Seriøs áhugaði kunnu venda sær til okkum á telefon 318930/505300, telefaks 318703 ella t-post rannteld@rannteld.info

RannTeld er eitt bókhaldsvirki, sum røkir skrivstovu-, bókhalds- og aðrar uppgávur fyri einstaklingavirkir, smápartafeløg og partafeløg. Eftirspurningurin eftir teimum tænastum RannTeld veitir er støðugt vaksandi, samstundis sum tænastuumráðið eisini økist í hvørjum. RannTeld byrja í sítt virksemi í 1991 við einum starvsfólki. Í dag hevur RannTeld fýra fólk í starvi.